# Gerðabók í sambandi við býráðsfund 3/2021

**Dagfesting:** 25.03.2021 kl. 19:00
**Málnr.:** 21/00071-3

Nevndarlimir: Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Sonni á Horni, David Andreasen, Edva Jacobsen, Ólavur Larsen, Magni Jøkladal, Eivin Breiðaskarð og Gudny Vang

Varalimir:

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Henrik Weihe Joensen, kommunustjóri

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| 10/21 | 20/00586-45 | Uppskot til ískoytissáttmála í sambandi við liðugtgerð av barnaskúlanum |
| 11/21 | 21/00206-3 | Tillaðing av serstøku byggisamtyktini fyri økið B1, Toftanesvegur, Fuglafjørður |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ Í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

10/21

## 20/00586-45 Uppskot til ískoytissáttmála í sambandi við liðugtgerð av barnaskúlanum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.03.2021 | 10/21 |
| 2 Býráðið | 25.03.2021 | 10/21 |

## Tilráðing

| Til viðgerðar í | Fíggjarnevndini |
|---|---|
| Stutt lýsing | Liðugtgerðin av nýggja barnaskúlanum er seinkað, tí tíðarætlanin fyri liðugtgerðina var tann 2. november 2020, tá dagbøtur eisini skuldu falla. Men í november í fjør kom høvuðsarbeiðstakarin MT Højgaard við mótkravi á umleið 970 tús. kr. grundað á, at fyritøkan slapp ov seint ígongd við arbeiðið.<br><br>Síðani hava fundir verið hildnir bæði í bygginevnd og millum byggileiðara, Rúna Abrahamsen, Ewald Kjølbro frá MT Højgaard og ávíkavist Sonna á Horni, fyrrverandi borgarstjóra og núverandi borgarstjóra Dávur Juul, har eisini undirritaði hevur verið við á hesum fundum.<br><br>Fyrrverandi og núverandi borgarstjóri eru samdir um at fylgja tilmælinum frá byggileiðara Rúna Abrahamsen, og gera eina semju við MT Højgaard um, at kostnaðurin fyri høvuðsarbeiðstakarans útreiðslur og møgulig krøv í sambandi við longda byggitíð er ásettur til at verða 850 tús. kr. Nevnda upphædd verður ikki útgoldin MT Højgaard, fyrrenn øll arbeiðir eru endaliga liðug og góðkend. Ískoytissáttmálin ásetir, at endalig avhending av øllum arbeiðum í sambandi við liðugtgerðina av barnaskúlanum skal verða 8. apríl í ár.<br><br>Rúni Abrahamsen, byggileiðari, hevur í hesum sambandi gjørt uppskot til ískoytissáttmála, sum er lagdur við hesum máli.<br><br>**Framhald 18. mars 2021**<br>Fíggjarnevndin hevur á fundi 17. mars í ár samtykt, at taka undir við fyriliggjandi uppskoti til ískoytissáttmála millum Fuglafjarðar kommunu og MT Højgaard; í hesum sambandi kravið frá MT Højgaard á 850 tús. kr. fyri longda byggitíð. Fíggjarnevndin viðmerkti til sáttmála-uppskotið, at tað er týdningarmikið, at lekin í takinum eisini er fevndur av sáttmálanum. Kommunustjórin hevur spurt byggileiðara, Rúna Abrahamsen, hesum viðvíkjandi, og fingið at vita, at ætlanin er tetta |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ Í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | |
|---|---|
| | lekan í mai mánaða. Gerð av lekanum í takinum er tí fevndur av sáttmálanum, hóast hann ikki er positivt nevndur í sáttmálatekstinum. |
| Bakgrund | Seinkan av liðugtgerðini av barnaskúlanum og í hesum sambandi mótkrav frá MT Højgaard um longda byggitíð. |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>**Arbeiðstakarasáttmálin partanna millum, dagfestur 20. desember 2018**<br>**Uppskot til ískoytissáttmála millum Fuglafjarðar kommunu sum byggiharra og MT Højgaard sum arbeiðstakara, dagfestur 10. mars 2021**<br>• Møgulig fylgiskjøl<br>**Uppskot til ískoytissáttmála millum Fuglafjarðar kommunu sum byggiharra og MT Højgaard sum arbeiðstakara, dagfestur 10. mars 2021**<br><br>**Fundarfrágreiðing, dagfest 20. november 2020, í sambandi við fund hjá MAP Arkitektum viðvíkjandi liðugtgerðini av barnaskúlanum**<br><br>**Fundarfrágreiðing, dagfest 22. desember 2020, í sambandi við fund við byggileiðsluna viðvíkjandi liðugtgerðina av barnaskúlanum**<br><br>**Skjal 2, dagfest 20. januar 2021, samlaður kostnaður í mun til uppruna meting** |

| Viðgerð | | | |
|---|---|---|---|
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Ja | Møguliga |
| | Umsitingarligar | Ja | Møguliga |
| Tilmæli | Borgarstjórin og kommunustjórin mæla til, at fylgja tilmælinum frá Rúna Abrahamsen, byggileiðara, og góðkenna fyriliggjandi uppskot til ískoytissáttmála, dagfestur 10. mars 2021, og harvið góðkenna mótkravið frá MT Højgaard áljóðandi 850 tús. kr. | | |
| Dagf | 15. mars 2021 | | |

3

**Fíggjarnevndin 17. marts 2021:**
Fíggjarnevndin samtykti, at taka undir við fyriliggjandi uppskoti til ískoytissáttmála millum Fuglafjarðar kommunu og MT Højgaard, men við nøkrum spurningum, sum kommunustjórin kannar nærri í samráði við byggileiðaran Rúna Abrahamsen, eitt nú viðvíkjandi tí at takið í barnaskúlanum lekur, um tað positivt skal standa í sáttmála-tekstinum.

**Býráðið 25. marts 2021:**
Býráðið samtykti einmælt (9-0), at fylgja tilmælinum hjá fíggjarnevndini og góðkenna fyriliggjandi uppskot til ískoytissáttmála millum Fuglafjarðar kommunu og MT Højgaard.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ Í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

## 11/21
## 21/00206-3 Tillaðing av serstøku byggisamtyktini fyri økið B1, Toftanesvegur, Fuglafjørður

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 24.03.2021 | 27/21 |
| 2 Býráðið | 25.03.2021 | 11/21 |



## Tilráðing

| | |
|---|---|
| Til viðgerðar í | Teknisku nevnd. |
| Stutt lýsing | Í sambandi við fyrireiking av lendisarbeiði viðvíkjandi framtíðar bústaðarbygging, sum er í trá við bústaðarpolitikkin hjá Fuglafjarðar kommunu, hevur umsitingin gjørt uppskot til broyting í serstøku byggisamtyktini fyri økið B1, sum fevnir um matr. nr. 882b, ag og E, Fuglafjørður.<br><br>Nettonýtslustigið er broytt til 2,0.<br><br>Rættingar eru gjørdar í punkt 1, 4 og 8 í serstøku byggisamtyktini fyri nevnda økið.<br><br>Víst verður til skjal, sí FK j. nr. 21/00206-1, sum er eitt skriv, sum lýsir broytingarnar.<br>Víst verður eisni til plantekning nr. 01, sí FK j. nr. 21/00206-2, sum vísir broytingarnar.<br><br>Vegaøkið, matr. nr. ag, Fuglafjørður, verður víðkað nakað í mun til verandi serstøku byggisamtykt fyri økið B1.<br><br>Tá málið hevur verið viðgjørt í teknisku nevnd í dag, so verður málið lagt fyri býráðið til endaliga góðkenning 25. mars. Síðani verður uppskotið til broyting í nevndu byggisamtykt lagt til alment eftirlits. |
| Bakgrund | Broyting í serstøku byggisamtyktini fyri økið B1 úti á Land, Toftanesvegur, Fuglafjørður. |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tilíkt**<br>Byggisamtyktin<br>BK17<br>Løgtingslógin um býarskipanir og byggisamtyktir<br>• **Møgulig fylgiskjøl** |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | FK j. nr. 21/00206-1 Skriv, sum lýsir broytingina í serstøku byggisamtyktini fyri økið B1<br>FK j. nr. 21/00206-2 Plantekning nr. 01, sum lýsir broytingina í serstøku byggisamtyktini fyri økið B1 | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur ið lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Ja | Ja |
| | Umsitingarligar | Ja | Ja |
| Tilmæli | Kommunala umsitingin mæla til at gera nevndu broytingar í serstøku byggisamtyktini fyri økið B1, Toftanesvegur, úti á Land, Fuglafjørður. | | |
| Dagf | 24. mars 2021. | | |

**Tekniska nevnd 24. marts 2021:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum.

**Býráðið 25. marts 2021:** 6
Býráðið samtykti einmælt (9-0), at fylgja tilmælinum frá teknisku nevnd, og góðkendi at gera nevndu broytingar í serstøku byggisamtyktini fyri økið B1, Toftanesvegur, úti á Land, Fuglafjørður.

Fundurin lokin kl. 19:30

Gerðabókin lisin og góðkend.

Dávur Juul

Eyðun á Lakjuni

Sonni á Horni

David Andreasen

Edva Jacobsen

Magni Jøkladal

Ólavur Larsen

Gudny Vang

Eivin Breiðaskarð



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ Í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo